**ÍtróttaNAVNIÐ**

***Leiðreglur:***

Ársins ÍtróttaNAVN er eitt ítróttafólk ella -lið, sum hevur skarað framúr undanfarna árið, og tí hevur uppiborið hendan heiður. Íðkarar, serliga úrvalsíðkarar, hava dreymar um at standa ovast á tindunum og arbeiða hart og miðvíst at røkku sínum máli/málum. Ársins ÍtróttaNAVN skal hava gjørt stór framstig í síni ítróttagrein og gjørt vart við seg á altjóða stigi. Somuleiðis skal ársins ÍtróttaNAVN hava skapt frambrot í ítróttinum.

***Arbeiðsgongd:***

1. Bert nøvn, sum umboða føroyskt samband undir ÍSF kunnu viðmælast. Tó kunnu ítróttagreinar, sum eru góðkendar undir IOC, men ikki umboðaðar í Føroyum, viðmælast.
2. Sambondini og starvsnevnd ÍSF kunnu senda inn uppskot. Til ber eisini at viðmæla ítróttafólk/-lið, sum umboða aðra ítróttagrein enn tann, sambondini sjálvi umboða.
3. Starvsnevndin velur upp til 10 nøvn millum innkomnu uppskotini.
4. Ítróttafjølmiðlafólk atkvøða.

Uppskot við grundgeving verða at senda til ÍSF:

(1) Hvør innstillar
(2) Tel.nr.
(3) Hvør er innstillaður
(4) Nágreinilig grundgeving

**Bústaður/address:**
Yviri við Strond 13
Postrúm 223
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

**Telefon/Tel.:**
+298 312606

**Telefax/Fax:**
+298 319312

**Teldupostur/E-mail:**
isf@isf.fo

**Heimasíða/Web:**
www.isf.fo

ATLANTIC AIRWAYS